# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tillukku Grønland!

Í dag byrjar ein nýggj tíð í Grønlandi. Tann hjálandaskipan, sum í 1721 byrjaði við Hans Egede er loksins av. Við sjálvstýrislógini er ein kollveltandi tilgongd at enda komin. Siumut, sum hevur havt politiska valdið í trýati ár, hevur fingið durafjóðringin. IA hevur fingið dygga undirtøku og myndar nú stjórn saman við Demokratunum. Við hesum fær nýggja Grønland eina mið-vinstrastjórn, sum er sera væl útborin at leiða Grønland inn í eitt nýtt politiskt og mentanarligt tíðarhvarv. Á odda fyri nýggju stjórnini stendur karismatiski, dugnaligi og sera væl útbúgvni Kupik Kleist og við honum eitt sera væl skúlað og ungt ættarlið av eldhugaðum og virkisfýsnum kvinnum og monnum. Skiftið er sostatt ikki bert eitt politiskt stjórnarskifti men eitt ættarliðskifti, ið eisini fevnir um Siumut, har tríggjar yngri kvinnur við Aleqa Hammond á odda hava fingið leiðsluna.

Her er veruliga talan um ein nýggja byrjan fyri ungu grønlendsku tjóðina – eitt skifti í tøkum tíma. Grønlendska fólkið er vorðið viðurkent sum tjóð við fullum sjálvsavgerðarrætti sambært fólkarættarligum meginreglum, grønlendskt mál verður nú landsins almenna mál, og Grønland fær nú ognarrættin til ráevni í undirgrundini. Politiski og búskaparligi týdningurin av hesum kann valla yvirmetast eftirsum Grønland er ómetaliga ríkt til alskyns ráevni. Grønland, ið er einasta land, sum hevur meldað seg út úr ES, fær nú framúr góða partnaraavtalu við ES, sum skal medvirka til at menna grønlendsku útbúgvingarskipanina og at menna mentanarliga og útbúgvingarliga samstarvið millum Grønland og umheimin.

Stóri spurningurin er, hvussu nýggja sjálvstýrisskipanin fer at roynast og hvussuleiðis nýggja ættarliðið av politikarum fer at megna at fylla út nýggju politisku karmarnar. Alt bendir á, at henda verkætlan fer at eydnast. Teir landsstýrisflokkar, ið nú hava politiska valdið, hava sera góðar fortreytir fyri at leiða tjóðina inn í ta nýggju tíðina. Manningin er ikki bert vælútbúgvin, men hon hevur greið mál og væl úr hondum greiddar strategiir til at røkka hesum málum. Hendan manning hevur sjálvsálit, sjálvsvirðing og djúpa virðing fyri máli og mentan hjá upprunligu grønlendsku tjóðini, inuit. Hartil kemur, at nýggja grønlendska stjórnin hevur breiða fólksliga uppbakking. Grønlendski almenningurin er troyttur av donskum formyndaríi, donskum dominansi og neokolonialum royndum at nýta Grønland í uttanríkispolitiskum taktiskum spæli. Nú skal vend koma í og vend fer ivaleyst at koma í á mongum økjum. Men leiðin verður drúgv og long og fer at krevja tol, áhaldni og treysti. Alt bendir á, at unga grønlendska tjóðin hevur hesar eginleikar. Um stjórnarflokkarnir kunnu semjast, so fara teir uttan iva at koma væl á leið fram at politisku málunum. Spurningurin um okkara viðurskifti við nýggja Grønland hevur stóran týdning. Vit skulu enda við at minna á, at her eisini er tørvur á nýggjari byrjan, og vit kunnu hóskandi byrja við at stovna føroyska sendistovu í Nuuk sum skjótast og siga enn einaferð: Tillukku Grønland!

**Sosialurin**

## Tú ein lítlan – eg ein stóran

**HØGNI HOYDAL**



**Almennur fyrispurningur til Johan Dahl, landsstýrismann, Kaj Leo Johannesen, løgmann, og til føroysku fjølmiðlaleiðslurnar um nevndarval hjá landsstýrinum**

Einaferð trúði eg, at tað var 1. apríl á jólum. Tað var tá landsstýrismaðurin, Johan Dahl, í desember 2008 setti sín floksfelaga, vinmann og fyrrverandi fíggjarmálaráðharran, Bárð Nielsen, í nevndina fyri Vága Floghavn. Men tað var ikki ein aprílsøga. Setti tí landsstýrismanninum fyrispurning í tinginum um, hvør saklig grundgeving var fyri hesum. Hann svaraði, at hann metti persónliga, at hetta var ein góður maður. Eg viðmerkti, at um tað var ein dygd at vera ábyrgdarleysur og koyra eitt land út á eggina búskaparliga, so var tað sjálvandi ein grundgeving. Men góð og saklig er hon ikki.

Í fjølmiðlunum og á tingi var tøgn.

Síðani var landið í vár í politiskari kreppu í fleiri vikur, orsakað av einum nevndarvali í Atlantsflogi hjá sama landsstýrismanni. Fólkaflokkurin kravdi broytingar og setti samgonguna uppá spæl. Men knappliga varð onkur "avtala" gjørd í samgonguni og millum landsstýrismannin og summar partaeigarar. Fólkaflokkurin bakkaði, tí nevndarvalið eftir øllum at døma setti onkran persón inn, sum stóð onkrum nær, ið stendur Fólkaflokkinum nær. Tá søgdu vit í andstøðuni, at helst er meiri í væntu, til tess at valdshandlarnir skulu ganga heilt upp.

Men í fjølmiðlunum og á tingi, var aftur tøgn.

**Og tað heldur fram...**

Nú kunnger landsstýrismaðurin í vinnumálum, at hann hevur valt nýggja nevnd fyri Vinnuframagrunnin. Formaður í grunninum er nú skrivarin hjá Fólkaflokkinum. Og ein nevndarlimur er nú sonur formannin í Fíggjarnevndini – tann enn veruliga leiðaran í Fólkaflokkinum.

Í fjølmiðlunum og á tingi, valdar larmandi tøgn.

Tað ætla vit í Tjóðveldi ikki at lata um okkum ganga. Sjálvandi kunnu vera góðar grundgevingar og góðar dygdir hjá fólki, hóast tey eru skrivarar í politiskum flokkum ella hava familjubond til politiskar leiðarar.

Men her krevjast spurningar og svar – og ikki tøgn og uttanumtos.

**Munur á krøvum**

Ein og hvør veit, at um ein nú eitt tjóðveldislandsstýrisfólk hevði sett ein av sínum floksfeløgum og fráfarnu landsstýrisfólkum í týðandi nevnd, so hevði alt verið á gosi.

Ein og hvør veit, at um ein skrivari hjá Tjóðveldinum, hevði verið settur sum formaður í týðandi nevnd, so høvdu spurningar hegla og svar verið kravd.

Og ein og hvør veit, at um sonur fremsta tjóðveldispolitikara, hevði verið settur í týðandi nevnd, meðan Tjóðveldi sat í landsstýri so var ongin prentsverta turr, ella mikrofon sløkt.

Og soleiðis skal tað sjálvsagt vera.

**Tann ið tegir, tekur undir**

Eftir mínum tykki eru vit vitni til grovar partapolitiskar handlar og ósakligar avgerðir, sum skulu og mugu viðgerast ment og ábyrgdarhavandi politikarar setast til svars.

At halda seg "neutralan" og tiga, tá ein gerst varur við ósakligheit og órætt, er í veruleikanum at taka støðu fyri óréttinum.

Í áttatiárunum vaknaðu øll við kaldan dreym – og tá skortaði knappliga ikki við atfinningum og greiningum, tá skipanirnar lógu naknar. Men ábyrgd snýr seg fyrst og fremst um at vísa rættstundis atgerð.

**Opinleiki og ábyrgd einasti heilivágur**

Eg krevji eitt alment svar frá bæði landsstýrismanninum í vinnumálum og frá løgmanni, um hvørjar sakligar grundgevingar eru fyri omanfyrinevndu nevndarvalum, og at teir leggja alment fram tey skjøl og ta málsviðgerð, ið hevur verið frammanundan hesum valum.

Somuleiðis biði eg um eitt alment svar frá redaksjonellu leiðslunum á bæði almennu og privatu fjølmiðlunum, um hví hesi nevndarval ikki verða viðgjørd í fjølmiðlunum og ábyrgdarhavandi politikarar kravdir eftir svari.

Føroyar eru eitt samfelag, har stutt er ímillum fólk, og tí aftra vit okkum kanska ofta at viðgera slík mál. Men í fleiri førum verður tað gjørt, tá talan er um "smærri fiskar". Og í øllum førum verður tað viðgjørt óalment – sum slatur ella tutl millum okkum. Og helst fara vanligu dulnevndu spjaðararnir at skíra míni orð fyri andstøðugrenj – og koma við øllum sínum vanligu grundleysu ákærum og uttanumtosi móti tí, ið finnist at, og halda meg leggja eftir teimum persónum, ið valdir eru.

Tí er einasti heilivágurin: Opinleiki, innlit, almenn viðgerð og grundgevingar – eisini til frama fyri øll tey, ið hava dygdir og kvalifikasjónir, uttan mun til politiskt tilknýti og familjubond, og sum ikki hava ábyrgdina av politisku avgerðunum og handlunum.

Men vit skulu halda tey, ið hava valdið og ábyrgdina til svars – rættstundis.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.